Kappingareftirlitið

DEKKMARKNAÐURIN

Brúkarin stendur við einum torførum vali í sambandi við dekkkeyp. Hvørji dekk eru at velja ímillum í mun til tað sum brúkarin er sinnaður at rinda og hvat við góðskuni?

Kappingareftirlitið hevur gjørt eina greining av marknaðinum, har dentur er lagdur á sambandið millum prís og góðsku, innflutningsmynstur, veitaraviðurskifti og tørvin hjá brúkaranum.

Greinin lýsir, hvussu ymisk dekkmerkir og støddir ávirka prísin, og hvussu brúkarar kunnu taka betri avgerðir grundað á tørv og koyrilíkindir.

Við støði í greiningum og marknaðartølum verður víst á, hvussu prísseting og vinningur eru skipað í Føroyum.

Greinin gevur eitt íkast til at skilja hvat ávirkar prísin á dekkum og hvussu brúkarar kunnu tryggja sær bestu loysnina.

1. Yvirskipað um dekkmarknaðin

1.1. Hvørji dekk hava vit í Føroyum

Kappingareftirlitið hevur í sambandi við kanningina staðfest, at flestu veitarar í høvuðsheitum innflyta nøkur fá dekkmerki til Føroyar, og hava á tann hátt sítt egna vøruúrval. Tað er ymiskt hvat einstøku veitararnir leggja seg eftir at veita. Nakrir veitarar innflyta í størri mun bílig dekk frá ókendum framleiðarum, meðan aðrir innflyta dýrari dekk frá viðurkendum framleiðarum.

Á sirkulmyndini niðanfyri sæst samlaði innflutningurin av dekkum til Føroyar árini 2015-2024 bólkað eftir útflutningslandi.[1] Innflutningurin á sirkulmyndini er uppgjørdur í krónum.

Mynd 1.1: Innflutningsvirðið av dekkum árini 2015-2024 býtt á útflutningsland.



Kelda: Hagstova Føroya

Sum tað framgongur av myndini, so kemur meginparturin av innflutninginum av dekkum frá trimum londum. Hesi eru Kina, Týskland og Danmark. 27% av innflutninginum kemur úr Týsklandi, 15% koma úr Kina og 15% koma úr Danmark. Her skal tó viðmerkjast, at ongin dekkframleiðsla er í Danmark, so innflutningurin úr Danmark kemur aðrastaðni frá.

Donsku innflutningstølini, sum Kappingareftirlitið hevur heintað frá Danmark Statistik, eru at síggja á sirkulmyndini niðanfyri. Talan er um innflutningstøl fyri árini 2015-2024.

Mynd 1.2: Innflutningsvirðið av dekkum árini 2015-2024 býtt á útflutningsland.



Kelda: Danmarks statistik

Meir enn helmingurin av innflutninginum til Danmark kemur úr Tysklandi. Onnur stór innflutningslond eru Kina, Svøríki, Niðurlond og Stórabretland.

Stóri munurin millum innflutningin í báðum londunum er at í Føroyum innflyta vit lutfalsliga meira úr Kina enn Danmark, meðan danir innflyta meira úr Týsklandi enn føroyingar.

Sambært útrokningum, sum Kappingareftirlitið hevur gjørt, við støði í donsku og føroysku innflutningstølum, hevur stórur munur verið á innkeypsprísinum í tíðarskeiðinum 2015-2024.

Í miðal var innkeypsprísurin hjá føroyskum veitarum 51,93 kr. fyri hvørt innflutt kg av dekk til Føroyar, meðan innkeypsprísurin hjá donskum veitarum var í miðal 38,42 kr. fyri hvørt innflutt kilo til Danmark.

Gongdin sæst á ritmyndini 1.3. Tað er óvist hvørjar orsakir eru til hendan munin.

[1] Tølini eru úr tollskránni hjá TAKS

Mynd 1.3: Prísur á innflutningi av dekkum per kg í Føroyum og Danmark 2015-2024



Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks statistik
Viðmerking: Tølini fyri Føroyar og Danmark eru gjørd upp í CIF (Cost ,Insurance and freight) sum merkir at flutningskostnaðir, trygging og avgjøld eru við í prísinum.

2. Veitarasíðan

Á veitarasíðuni eru 17 veitarar og standa hesir fyri áleið 90% av innflutninginum av dekkum til Føroyar. Føroyskar vinnufyritøkur standa fyri bróðurpartinum av beinleiðis innflutninginum. Tá tað kemur til beinleiðis innflutningin fara 9,7% av samlaða innflutninginum til egið brúk hjá fyritøkum og 0,3% fara til egið brúk hjá privatum brúkarum.

Eitt hent amboð at meta um kappingarstøðuna á einum marknað er Herfindahl Indeksi (HHI). Hetta vísital verður nýtt til at meta um miðsavningina á einum marknað. Vísitalið tekur atlit til bæði tal av fyritøkum og teirra marknaðarpart.

HHI verður funni við at marknaðarparturin í øðrum hjá øllum fyritøkum á marknaðinum verður lagdur saman. Til dømis, um ein marknaður hevur tríggjar fyritøkur á marknaðinum, ið hava ávikavist marknaðarpartar á 50%, 30% og 20%, verður vísitalið funni soleiðis:

Dømi:

$$HHI = 50^2 + 30^2 + 20^2 = 2500 + 900 + 400 = 3800$$

Kappingareftirlitið hevur roknað HHI fyri veitarasíðuna við støði í innflutningstølunum. Fyrilit skal takast fyri, at eftir hesum leisti kann marknaðarparturin hjá eini fyritøku við marknaðarmakt verða undirmettur.

Vanliga verður eitt HHI undir 1.000 mett at verða ein støða við virknari kapping. Millum 1.000 og 2.000 er talan um byrjandi miðsavning og oligopol gerst meira vanligt. Eftir 2000 og upp til 10.000 er talan um stóra miðsavning, har 10.000 eru monopolstøður.

Kappingareftirlitið hevur roknað HHI fyri føroyska dekkmarknaðin at verða 1.195, sum vanliga er ein ábending um virkna kapping.

Gáttin inn á marknaðin er lág. At síggja til eru ongar beinleiðis forðingar at byrja virksemi. Byrjanarkostnaðurin er lutfalsliga lítil og fevnir í høvuðsheitum um kapitalbinding í vørugoymslu. Tað eru ongin serlig krøv, t.d. um góðkenning í sambandi við byrjan av virksemi. Tað eru heldur ikki neyðugt at hava eitt fullfíggjað úrval.

3. Vøran

Tað eru fleiri viðurskifti, sum kunna hava týdning fyri brúkarin, tá hesin skal keypa dekk og tað er ymiskt hvat brúkarar leggja áherðslu á. Viðurskifti sum trygd, koyrieginleikar, orkunýtsla, haldføri og prísur hava ofta týdning fyri brúkaran.

3.1. Summar-, heilárs- og vetrardekk

Tey vanligu dekkini í ferðsluni í Føroyum eru summardekk, heilársdekk, vetrardekk, og so fáast dekk við píkum.

Tað eyðkennir summardekkið, at tað hevur gott tak í heitum asfalti, tí tað leggur seg tætt at asfaltinum. Men í kulda gerst gummi í summardekkum hart og tá hevur tað ikki gott tak í asfaltinum. Hetta ger seg galdandi uttan mun til um kavi, gler ella bert frostur er á vegnum.

Vetrardekk eru harafturímóti bleytari, og vera tí ikki eins hørð í kulda, sum ger at tey lættari fáa fatur á vegnum í kulda. Vetrardekk hava ikki tað besta takið í hita av tí at dekkini ikki taka eins væl í asfaltið orsaka av at dekkini eru bleytari. Umframt hetta slítast tey skjótt í hita. Vetrardekk hava 3PMSF merkið[2] á síðuni og eitt M+S-merkið. Á myndini niðanfyri sæst 3PMSF-merkið (fjalli) ovast og M+S merki.

[2] 3PMSF merkir Three-peak mountain snowflake, ið er tað sum stendur á merkinum.

Tað eru bert vetrardekk, sum hava 3PMSF merkið og dekkið skal hava lokið nøkur almenn test-krøv til koyring í líkindum við nógvum kava og ísi.

M+S merkið stendur fyri Mud & Snow og merkir einans at dekkið er sniðgivið soleiðis, at tað skal verða betri at koyra við í runu og kava enn eitt vanligt summardekk. Tað eru ongin almenn test krøv til hetta merkið.

Heilársdekki er merkt við M+S merki og áðrenn 30. apríl 2025 kundi hesi nýtast alt árið eisini í hálku. Fyrimunurin við heilársdekkum var at tey vóru betri at koyra við um summari enn vetrardekk og møguligt var at koyra allan veturin við heilársdekkum. Eftir 30. apríl kunna heilársdekk ikki nýtast sum vetrardekk.

Bæði heilársdekk og vetrardekk hava M+S merkið, men bert vetrardekk kunnu fáa 3PMSF merkið og bert eftir at hava lokið eina almenna test.

3.2. Áskriftin á dekkunum

Flest øll hava nokk lagt til merkis, at har eru nøkur tøl, bókstavar og merkir á dekkunum. Í hesum parti verður greitt nærri frá áskriftini á dekkum.

Á myndini niðanfyri er ein nærri frágreiðing av áskriftini.

Fyrstu trý tølini 195, 55 og 16 snúgva seg um støddina á dekkinum. Fyrst talið vísir á hvussu víður dekkbanin á dekkinum er. Næsta talið er hvussu høg dekkini eru í lutfall av dekk víddini og triðja talið er tvørmáti á felguni. Bókstavurin áðrenn 16 merkir Radial og vísir hvussu dekkið er uppbygt. Har kann eisini standa B fyri belted ella D fyri diagonal, men flest øll dekk, sum verða seld til privatar brúkarar, eru radial dekk.

Síðani stendur 87V, har 87 er ein kota fyri hámarksvekt og V er ein kota fyri hámarksferð. Ítøkiliga merkir kotan 87 at hvørt dekk á bilinum kann bera 545 kg. Hetta merkir at samlaða vektin av bili, ferðafólkum og viðføri kann ikki verða omanfyri 545x4 = 2180 kg. Kotan V merkir at hámarksferðin er 240 km/t.

DOT – kotan er altíð á dekkinum og stendur vanliga á síðuni á dekkinum. Tað sum er serliga áhugavert við DOT-kotuni er tey fýra seinastu tølini. Tí hesi siga hvørja viku og hvat ár dekkini vóru framleidd. Eru fýra tey seinastu tølini t.d. “2923”, so merkir hetta at dekkini eru framleidd í 29 viku í 2023. Sí mynd niðanfyri:

Fyri brúkaran hevur hetta týdning, tí vanliga reglan er tann, at dekk, sum eru eldri enn 10 ár, skulu beinast burtur uttan mun til um tey eru brúkt ella ikki.

Tað verður viðmælt brúkarum at keypa nýggj dekk, sum ikki hava ligið á goymslu ov leingi og at ikki keypa dekk eldri enn 5 ár. Hetta ger seg serliga galdandi fyri brúkarar, ið koyra lítið. Trupulleikin er, at gummi í dekkum versnar við árunum orsaka av oxidering. Gummi gerst minni liðiligt og hevur lættari við kloyvna. Brúkarar, sum ikki koyra nógv, kunnu tí koma út fyri at dekkini skulu skiftast orsaka av elli heldur enn slitið, tí eitt dekk kann halda millum 60.000 km og 120.000 km av koyring.

3.3. Evropeisk góðkenningarskipan av dekkum

Í ES fyriskipan 2019/2144 um góðkenning av motorakførum eru sett minstu krøv til dekk. Í ES Fyriskipan 2020/470 eru krøv sett í mun til hvørjar upplýsingar skulu verða á dekkum fyri at tryggja, at brúkarar hava nøktandi kunning í sambandi við dekkkeyp.

Fyriskipanin ásetur, at dekk sum verða seld í ES skulu hava spjaldur, sum vísir hvussu orku effektiv dekk eru og hvussu góð dekkini eru í regni. Eisini eru upplýsingar um larm frá dekkunum, og er talan um vetrardekk eru upplýsingar sum hvussu dekkið klárar seg í kava og ísi.

Spjaldri skal eisini hava eina QR-kotu sum vísir til ein dátugrunn EPREL, har upplýsingar eru um øll dekk sum verða innflutt til ES.

Niðanfyri er eitt EPREL-spjaldur. Á vinstru síðu (1) er ein avísing um, hvussu orku effektivt dekkið er. Støðini



ganga fra A til E, har E er ringast. Á høgru síðu (2) er ávísing um hvussu gott dekkið er í regni. Aftur gongur støði frá A til E, har E er ringast. Niðast í vinstra horni eru ávísingar um larm. Her verður bæði upplýst í decibell (3) og eisini verða dekkini bólka frá A til C í mun til larm (4), har ES lóggávan bert í serligum førum loyvir dekkið við C ávísing.[3]

Í vinstra horni kunnu vera ávísing viðvíkjandi koyring í kava og ísi um talan er um vetrardekk. Sum áður víst á, er 3PMSF merkið(5) ein altjóða standardur har dekkið skal hava lokið nøkur almenn krøv viðvíkjandi kavakoyring. Merkið fyri hálkukoyring(6) er ein altjóða ISO standardur fyri dekk. Fyri at fáa frámerkið skal dekkið lúka eina test fyri bremsing á glerstoyttum undirlagi.[4]

3.4. Ferðslulóggávan

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, við seinni broytingum er í §10 ásett heimild til landstýrið at gera fyriskipanir fyri akfør. Við hesi heimild hevur landsstýri gjørt kunngerð nr. 59 frá 5. mai 2021 um nýtslu av dekkum. Í henni er ásett hvat er galdandi dekkum viðvíkjandi.

Sambært §2 er loyvt at koyra við vetrardekkum og summardekkum alt árið um ongin hálka er. Heilársdekk verða ikki nevnd í lóggávuni.

Í hálku kunna vetrardekk nýtast við og uttan píkar. Eitt vetrardekk er eitt dekk sum hevur 3PMSF merkið, sbrt. §1, stk. 1, sbr. §12. Øll onnur dekk kunna bert nýtast í hálku um keta er á teimum, sbrt. §2 í kunngerð um nýtslu av dekkum.

Í mun til undanfarin ár er tann broyting farin fram, at dekk við merkinum M+S, MS, M&S, M-S og Mud & Snow, ið ikki hava 3PMSF merkið, eru at meta sum summardekk, sbrt. §1, stk. 4, sbr. §12 í kunngerð um nýtslu av dekkum.

Vetrardekk við píkum eru bert loyvd í tíðarskeiðinum 16. oktober til 14. mai, sbrt. §3 í kunngerð um nýtslu av dekkum.

Fyri vetrardekk eru galdandi at dekkini skulu hava eina mynsturdýpd, sum er í minsta lagi 3 mm frá 1. desember til og við 30. apríl og frá 1. mai til og við 30. november skulu dekkini hava eina mynsturdýpd sum er minst 1,6 mm.

Fyri summardekk er galdandi at mynsturdýpdin alt ári skal verða í minsta lagi 1,6 mm á akførum sum totalvekt á max 3.500 kg. Er vektin hægri enn 3.500 kg

[3] https://energy-efficient-products.ec.europa.eu/product-list/tyres_en#external-rolling-noise

[4] https://energy-efficient-products.ec.europa.eu/product-list/tyres_en#ice-tyres

skulu dekkini hava eina mynsturdýpd á í minsta lagi 1 mm.

Í øllum bilum er eitt dekkskelti, har tað framgongur hvørji dekk framleiðarin viðmælir til bilin.

Dekkskeltið er ofta at finna á hurðakarminum á førarasíðuni(1), í handskarúminum (2), innanfyri á áfyllingarlúkuni(3), ella í handbókini til bilin (4).

Tó er møguligt at keypa dekk við hægri load index og speed rating enn kravið er, men ikki lægri.

4. Prísurin á føroyska marknaðinum

Kappingareftirlitið hevur biðið um tilfar frá teimum størstu dekk veitarunum í Føroyum, sum umboða áleið 85% av samlaða innflutninginum. Ymiskt er hvussu dekkveitararnir skráseta tilfar og tí fevnir henda kanning um áleið tveir triðingar av innflutninginum frá januar 2023 til juli 2025.

4.1. Prísur í mun til dekkslag

Kappingareftirlitið hevur við støði í søluprísum frá dekkveitarum funnið fram til, hvat verður rindað lutfalsliga fyri hvørt slag av dekkum.

Tey bíligastu dekkini í Føroyum eru heilársdekkini, næst teimum eru summardekkini, ið ein skal gjalda í miðal 17,1% meira fyri, har eftir skal ein gjalda 48,7% meira fyri vetrardekk og 109,6% meira fyri píkadekk á føroyska marknaðinum.

Tað kunnu vera fleiri orsakir til hesar munir. Kappingareftirlitið metir, at hesir orsakir kunna bólkast í brúkaraviðurskifti, framleiðsluviðurskifti og veitaraviðurskifti.

Tað er ikki óhugsandi at brúkarin er meira sinnaður at rinda fyri góðsku á vetrardekkum og píkadekkum enn á heilárs- og summardekkum. Brúkarin er eggjaður til at keypa betri dekk partvís orsaka av egnari trygd, men eisini í mun til tey lógarkrøv, sum eru og tað eftirlit, sum Løgreglan hevur í sambandi við vetrarkoyring. Tað er helst ikki eins týðandi, hjá brúkaranum at hugsa um trygd í sambandi við keyp av summardekkum og somuleiðis eru krøvini til summardekk ikki líka høg.

Framleiðsla av vetrar- og píkadekkum er somuleiðis uttan iva dýrari enn av summardekkum. Tað skal meira tilfar til dekki og fyri at fáa neyðuga 3PMSF-frámerki skal dekkið lúka eina test viðvíkjandi koyring í kava og hálku. Hetta økir møguliga um framleiðlsu-kostnaðin.

Ein møguleiki er, at veitarar prísseta vetrardekk og summardekk eftir ymiskum leisti. Prísurin á vetrardekkum er helst minni elastiskur enn prísurin á summardekkum. Hetta kemst av, at vetrardekk eru neyðug undir krevjandi koyrilíkindum, har bæði lógarkrøv og eftirlit gera sítt til at tryggja, at tey verða brúkt. Tá koyrilíkindini eru vánalig, eru eingir veruligir substituttar til vetrardekk, og brúkarar raðfesta trygd fram um kostnað.

Hinvegin eru summardekk ikki eins neyðug sum vetrardekk. Lógarkrøvini eru ikki eins strong, og í flestum førum kunnu heilársdekk brúkast ístaðin. Góð summardekk betra um koyrieginleikarnar, serliga á turrum vegi, men hava annars avmarkaðan týdning, t.d. tá ið talan er um trygd undir krevjandi koyrilíkindum.

4.2. Bruttovinningurin á dekkum

Kappingareftirlitið hevur kannað hvat brutto-vinningurin[5] hevur verið á teimum dekkum, sum eru innflutt í tíðarskeiðinum 1. januar 2023 til ultimo juni 2025. Niðanfyri er stabbamynd sum vísir bruttovinning á dekkum.

[5] Bruttovinningurin í hesi grein er allýstur sum søluprísur frádrigið keypspris og er vektaður í mun til nøgd.

Mynd 4.2A: Hægsti, lægsti og miðal bruttovinningurin í vinnuni



Kelda: Egnar útrokningar

Á myndini sæst miðal bruttovinningurin, hægsti bruttovinningurin og lægsti bruttovinningurin á innfluttum dekkum í tíðarskeiðinum.

Miðal bruttovinningurin er 39%, meðan hægsti bruttovinningurin er 54,7% og lægsti bruttovinningurin er 35,1%. Tað er sostatt munandi størri munur millum hægsta bruttovinningin og miðal bruttovinning enn millum miðal bruttovinningin og lægsta bruttovinningin.

Verður hinvegin hugt eftir teimum trimum mest seldu dekkunum hjá hvørjum einstøkum veitara, so er miðal bruttovinningurin 49%. Hetta merkir at føroyskir veitarar leggja mest á tey dekkini, sum selja mest og minni á tey dekk, sum lítið verður selt av.

Kappingareftirlitið hevur eisini hugt eftir, um tað er munur á bruttovinninginum á dekkum sum veitarar, sum eisini hava bilasølu, selja og aðrir veitarar selja.

Á stabbamyndini niðanfyri er bruttovinningurin og bruttovinningurin vekta við sølunøgd hjá bilasølum og øðrum veitarum.

Mynd 4.2B: Bruttovinningur deilt á slag av fyritøku



Kelda: Egnar útrokningar

Sum tað framgongur av stabbunum er ikki tann stóri munurin á bruttovinninginum á dekkum hjá bilasølunum og øðrum veitarum, men um bruttovinningurin verður vektaður við sølunøgdini eisini, broytist myndin. Bilasølurnar hava ein vektaðan bruttovinning á 50,2%, meðan aðrir hava ein vektaðan bruttovinning uppá 41,8%.

Orsøkin til henda mun ímillum bilasølur og aðrar veitarar kunnu vera fleiri. Ofta innganga góðskudekk í sambandi við søluni av einum bili. Tað kann t.d. geva meining fyri eina bilasølu at geva avsláttur uppá dekk við høgum bruttovinningi heldur enn av sjálvum bilinum. Yvirhøvur kann hugsast at brúkarar, sum venda sær til bilasøluna, hava tokka til at verða heilkundar og góðtaka at rinda eitt sindur meira.

Somuleiðis er tað uttan iva soleiðis, at aðrir veitarar ikki hava sama sterka knýti til sína kundar og skulu tí í størri mun lokka kundar til við lægri prísum. Tað kann eisini verða at kundar sum venda sær til dekkverkstøð og onnur verkstøð eru meira tilvitaðir um prís og vilja hava dekk sum eru lág- ella miðal prís -klassanum.

Eisini er møguligt at tað væntast av øðrum veitarum, so sum dekkverkstøðum, at teir hava eitt breiðari úrval og harvið koma at hava ein riðil av dekkum, sum ikki selja nóg væl, og mugu tískil seljast við minni vinningi.

Viðmerkjast skal at omanfyri nevnda eru hugleiðingar um hví prismunur er millum bilasølurnar og aðrar veitarar, tá vektað verður við sølunøgd. Kappingareftirlitið hevur í hesi greining ikki staðfest veruligu orsøkirnar til prísmunin.

4.3. Prísur og vørumerki

Í Føroyum vera seld nógv ymisk dekk merkir og tað kann verða trupult at meta um góðskuna.

Kappingareftirlitið hevur gjørt eina roynd at bólka merkini eftir dygd, fyri at vísa hvar vinningurin er hægst. Við hesum sæst hvørji merkir er dýrast. Kappingareftirlitið hevur bólkað merkini í fýra bólkar: Premium, Mid-range, Economy og Budget. Bólkingin tekur støði í heimasíðuni www.tyrereviews.com.

Á talvu 4.3 eru tey dekk sum verða seld á føroyska marknaðinum bólka í mun til dygdmetingina hjá www.tyrereviews.com.

Talva 4.3: Dekkmerkir á føroyska marknaðinum bólka eftir dygdmetingini hjá Tyrereviews.

Premium	Mid Range	Economy	Budget
Bridgestone	Barum	Apollo	Arivo
Continental	BFGoodrich	Atlas	BKT
Dunlop	Cooper	Ceat	Deli Tyre
Goodyear	Falken	Dayton	Fortuna
HanKook	Firestone	Evergreen	Gislaved
Michelin	GT Radial	Greenmax	Goodride
Pirelli	Kumho	Gripmax	Grenlander
	Maxxis	Kenda	iLink
	Nexen	Landsail	Imperial
	Nexen	Lassa	Minerva
	Nokian	Leao	Nordexx
	Toyo	Sava	Ovation
	Toyo	Torque	Rotalla
	Vredestein	Triangle	Superia
	Yokohama	Viking	Tourador
		Zeta	Tracmax
			Tristar
			Westlake
			Windforce

Kelda: Tyrereviews.com

Viðmerkjast skal at áleið 60% av teimum dekkum sum verða seld í Føroyum hoyra til budget-bólkin.

Á stabbamyndini niðanfyri sæst bruttovinningurin innan fyri hvønn bólk av dekkum bæði í prosentum og í krónum.

Mynd 4.3: Miðal bruttovinningur á dekkum innan dygdarbólkarnir hjá Tyrereviews.com



Kelda: Egnar útrokningar

Sum tað framgongur, so er bruttovinningurin í prosentum lægstur í Premium bólkinum og hægstur í Budget bólkinum. Bruttovinningurin á Premium merkjum er 35,7%, 41,1% á Mid range merkjum, 39,9% á Economy merkjum og 46,6% á Budget-merkjum.

Verður hinvegin hugt eftir bruttovinninginum í krónum er vinningurin størst á Premium vørumerkjum og lægstur á Budget vørumerkjummerkjum. Brutto–vinningurin á einum Premium vørumerkið er í miðal 632,20 kr., meðan bruttovinningurin á Budget-vørumerkjum er í miðal 376,80 kr.

4.4. Prísur og dekkstødd

Prísurin á dekkunum fylgir í stóran mun støddini á dekkunum, eins og støddin á dekkunum fylgir støddini á bilinum og harvið vektarkrøvunum.

Av tí at støddirnar, sum nevnt áður, eru ein samanrenning av trimum mátum, hevur Kappingareftirlitið brúkt ein frymil at finna eitt mát, sum kann umboða støddina við einum talið. Hetta so vit kunnu deila tey í støddarbólkar.

Vit hava brúkt ein frymil, sum mátar rúmið á dekkinum og tískil áleið hvussu nógv tilfar er í dekkinum og hava síðani deilt dekkini í 5 støddir..

Vit kalla hesar støddir lítil, undir miðal, miðal, yvir miðal og stór dekk. Fyri at lýsa hvørjir bilar koyra í hesum støddarklassum kann sigast, at tey smáu dekkini verða nýtt til bilar sum Fiat Panda, Hyundai i10 og Kia Picanto. Undir miðal dekkini eru á bilum sum Dacia Sandero, Renault Clio og Peugeot 208. Miðal dekkini eru á bilum sum VW Golf, Toyota Yaris Cross og VW T-Roc. Yvir miðal støddin er til bilar sum BMW 3 serian, Mercedes-Benz E-Class og skoda superb og tey stóru dekkini eru til bilar sum BMW X5, Mercedes-Bens GLE-Class og Volvo XC90.

Á stabbamyndini niðanfyri er miðal søluprísurin á dekkum bólkað í mun til stødd.

Mynd 4.4: Miðalprísurin á dekkum deilt á 5 støddarbólkar av dekkum



Kelda: Egnar útrokningar

Miðalprísurin fyri eitt dekk í bólkinum "lítil" er 764,43 kr., fyri bólkin "undir miðal" er prísurin 1.011,71 kr., fyri bólkin "miðal" er prísurin 1265,65 kr., fyri yvir

miðal er prísurin 1.448,28 kr. og fyri bólkin “stór” er 1.969,94 kr.

Hetta merkir, at brúkarir við einum stórum bili gjalda 150% meira fyri dekk enn ein, ið hevur ein lítlan bil. Afturat hesum slíta stórir bilar dekkini skjótari, orsaka av at teir viga meir, krafta meir og koyra skjótari, ið alt slítur uppá dekkini.

Um brúkarar ynskja at finna út av í hvørjum bólki dekkini, sum eru á teirra bili eru bólkaði í hesi kanning skal fylgjandi frymil brúkast:

$$2 * \text{vídd} * \frac{\text{Hædd í lutfall av víddini}}{100} + 25{,}4 * \text{Felgu tvørmát}$$

Síðani kann úrslitið samanberast við tey markvirði sum eru í niðanfyri standandi talvu.

Talva 4.4: Støddarbólkingarnar

Dekk stødd	Úrslit við nýtslu av frymli
Lítil	<486
Undir miðal	486-634
Miðal	634-690
Yvir miðal	690-723
Stór	723<

Kelda: Egnar útrokningar

Um t.d. úrslitið er 535, so hoyri dekki til tað stødd sum eitur “undir miðal”, tí úrslitið liggur ímillum markvirðini 486-634.

Hátturin støddirnar eru deildar upp í, er eftir teimum dekkunum sum eru í tilfarinum kappingareftirlitið hevur fingið. Hesi dekk eru øll deild upp í líka stórar bólkar, og tískil merkir tað at t.d. bólkurin “lítil” er tey 20% minstu dekkini í tilfarinum og ikki ein definera stødd uppá hvat eitt lítið dekk er.

4.5. Prísur og hámarksásetingar

Dekk hava tvær hámarksásetingar, ið eru Load index og speed rating. Á føroyskum kunna vit nevna hesar hámarksvekt, ið er hvussu nógva vekt dekkini í mesta lagi eiga at bera, og hámarksferð, ið merkir hvussu høga ferð kann koyrast við dekkunum.

Kappingareftirlitið hevur gjørt eina meting av hvussu hesi tøl ávirka prísin. Her er funnið fram til, at prísirnir í Føroyum verða ávirkaðir á tann hátt, at fyri hvørt eyka kg eitt dekk kann bera, rindar keyparin 1,76 kr. Tvs. eitt dekk við load index 90, sum er góðkent at bera 600 kg, kostar 1,76*150=264 kr. meira í miðal enn eitt dekk við load index 80, sum er góðkent at bera 450 kg.

Speed rating á føroyska marknaðin er tilsvarandi so at fyri hvønn kilometur um tíman, sum dekkini eru góðkend til at koyra skjótari, fer prísurin á dekkinum 3,03 kr. upp. Tvs. eitt dekk við speed rating Q, sum er góðkent at koyra 170 km/h kostar 3,03*10=30,3 kr. meira enn eitt dekk við speed index Q, sum er góðkent til 160 km/h.

Hvat er ein regressiónsgreining?
Ein regressiónsgreining er ein háttur at kanna sambandið millum tvey ella fleiri viðurskifti (vanliga kallað *variablar*).
Hon hjálpir okkum at síggja, hvussu nógv ein broyting í einum variabli (t.d. aldur, løn ella hitastig) ávirkar ein annan variabul (t.d. útgjald, sølu).
Til dømis:
– Vit kunnu brúka regressiónsgreining til at kanna, hvussu hitin ávirkar søluna av ísi.
Um hitin hækkar, kunnu vit við eini regressions-greining staðfesta um sølan vanliga veksur við hitanum og hvussu nógv sølan veksur.
Einfalt sagt:
Við regressiónsgreining verður roynt at finna eitt beinleiðis samband millum orsøk og úrslit.

Tað er týdningarmikið í hesum føri at hugsa um, at hesi tøl eru eitt slag av góðsku indikatorum, tvs. at hóast tað bert er loyvt at koyra 80 km/t í Føroyum, so er lógarkrav um at bilurin skal hava eitt dekk sum tolir at koyra líka skjótt sum bilurin megnar at koyra við einum puffara afturat. Speed rating sigur nakað um, hvussu bilurin liggur á vegnum og um ein koyrir ofta við høgari ferð, kann eitt dekk við ov lágum speed rating slítast óneyðuga skjótt. Tó er annars í flestu førum so, at tess hægri speed rating er, tess skjótari slítist dekkið. Leysliga kann tí sigast, at speed rating er ein uppvigan av hvussu nógv ein ynskir dekk sum eru behagilig at koyra við og haldfari. Load rating sigur eitt sindur um komfort, har eitt hægri index merkir at stoytdoyvingin minkar, sum gevur minni komfort. Umvent merkir tað eisini, at dekkini eru meira útroknilig á vegnum, sum gevur betri tamarhald á bilinum.

4.6. Val av dekkum

Tørvsmeting er ein grundleggjandi liður í at velja røtt dekk. Brúkarin eigur at meta um, hvussu og hvar hann vanliga koyrir. Verður koyrt mest í bygdum økið ella millum bygdir? Tað er munur á at skula av bygd hvønn yrkadag ella at kunna setast aftur um líkindini ikki eru góð.

Vanliga er samband millum prís og góðsku, men tað eru umstøðurnar hjá brúkaranum, sum í grundini eru avgerandi fyri hvat er rætta góðskan er til høvið.

Kappingareftirlitið vil viðmæla at brúkarar umhugsa hvat teirra tørvur er, áðrenn fari verður út at keypa dekk. Tí valið av dekkum eigur at grundast á egnar umstøður.

Hvørji dekk kunnu setast undir bilin eru viðurskifti sum frammanundan eru fastløgd. Tó uttan mun til støddina á dekkum er vanliga minst helvtar munur á prísinum á einum premium-merkir og einum budget-merki.

Er talan um brúkara sum koyrir rættiliga avmarkað og ikki hevur fyri neyðini at fara av bygd ella býi, so kann verða at eitt dekk í budget-klassanum er rætta valið. Er hinvegin talan um brúkara, sum koyrir nógv og skal koyra millum bygdir, so kann premium-dekki verða ein betri loysn bæði í mun til prís, men eisini grundað á trygd.

Tað kann verða torført at taka dagar millum øll viðkomandi viðurskifti í sambandi við dekkkeyp. Tí hevur Kappingareftirlitið gjørt eina regressions-greining fyri at stuðla brúkarum í sambandi við dekkkeyp.

Í regressiónini er funni fram til, at ávirkanin av um eitt dekk er heilársdekk, ikki er til at meta um. Hetta er helst tí at heilársdekk í sær sjálvum er eitt breitt hugtak, og tí er dátan sum verður nýtt at hyggja at ávirkanini av heilársdekkum nakað sum bæði kann minna um vetrardekk og um summardekk. Tí ber illi til at siga nakað ítøkiligt um hvussu nógv ein kann vænta at heilársdekk kosta, grunda á støddd og dygd.

Havast skal í huga at hetta eru metingar av ávirkanunum á prísinum fyri teir ymisku faktorarnar, og tískil er ein ávís óvissa í hesum. Serliga sæst ein óvissa um støddina á metingini sum liggja handan premium vetrardekk, og fyri yvir miðal, miðal og undir miðal støddirnar í hesum bólki er óvissan serliga stór.

Hetta merkir ikki at hesi tøl ikki kunnu nýtast, men bert at sanna miðaltalið kann liggja í einum stórum spenni.

Hetta sæst í tí sum nevnist eitt 95% konfidens interval, sí talvu A1 í appendix. Konfidens intervali sigur nakað um hvar miðaltalið liggur og tí merkir tað ikki at ein skal vænta at prísir ikki kunnu fara útum hetta spenni. Tó kunnu vit staðfesta at eygleidda ávirkanin er grunda á samanhangin í tølinum kappingareftirlitið hevur fingið, tó við einari óvissu á støddini á ávirkanini.

4.6.1 Vetrardekk

Úrslitini av regressiónsgreiningini fyri vetrardekk eru sett í talvuna niðanfyri

Talva 4.6A: Úrslit av regressiongreining fyri vetrardekk

Vetrardekk	Budget/ Economy	Mid range	Premium
Lítil	738	1.090	1.374
Undir miðal	959	1.381	1.789
Miðal	1.021	1.620	2.351
Yvir miðal	1.289	1.623	2.505
Stór	1.217	2.311	3.164

Kelda: Egnar útrokningar

Í talvuni sæst hvat miðal søluprísurin hevur verið á vetrardekkum, tá atlit verður tikið bæði til støddd og dygd.

Í sambandi við regressiónina var staðfest at tað var ongin týðandi munur á prísunum í bólkinum Economy og Budget. Tí eru hesir báðir bólkarnir samlaðir undir einum. Hetta sigur tó onki um dygdina, men bert um prísin. Á heimasíðuni har vit hava fingið bólkingarnar frá, www.tyrereviews.com, eru tey vørumerkir, sum eru í Economy bólkinum, mett at hava betri dygd enn tey, sum eru í Budget bólkinum.

Talva 4.1. vísir prísir á vetrardekkum eftir støddd og dygdarbólki. Talvan vísir at Premium dekk eru tey dýrastu, síðani koma Mid range dekk og bíligast eru dekkini í samanlagda bólkinum, Economy/Budget.

Talvan vísir ikki óvæntað at prísurin eisini hækkar við støddini á dekkunum uttan mun til dygdina.

Samanumtikið vísur talvan fyri vetrardekk at prísurin ávirkast av dygdini og av støddini:

- Lítil vetrardekk kosta úr umleið **738 kr.** (Economy) upp til **1.374 kr.** (Premium).
- Stór vetrardekk kosta úr umleið **1.217 kr.** fyri Economy upp til **3.164 kr.** fyri Premium.

Brúkarar kunnu í sambandi við keyp av vetrardekkum hava í huga hvar miðalkostnaðurin fyri einstøku bólkarnir eru fyri tað støddd av dekk sum ætlanin er at keypa.

4.6.2 Summardekk

Úrslitini fyri regressiónsgreiningina fyri summardekk eru niðanfyri.

Talva 4.6B: Úrslit av regressionsgreining fyri summardekk

Summardekk	Budget/ Economy	Mid range	Premium
Lítil	717	999	1.059
Undir miðal	774	1.261	1.343
Miðal	952	1.639	1.768
Yvir miðal	956	1.608	2.071
Stór	1.099	2.065	2.677

Kelda: Egnar útrokningar

Talvan 4.1. vísir miðalprísir á summardekkum eftir støddd og dygdarbólki. Talvan vísir at Premium dekk eru tey dýrastu, síðani koma Mid range dekk og bíligast eru dekkini í samanlagda bólkinum, Economy/Budget.

Tað sæst greitt, at prísurin hækkar bæði við støddd og dygd:

- Lítil summardekk kosta úr umleið **717 kr.** (Economy) til **1.059 kr.** (Premium).
- Størri dekk, sum eru vanlig á størri bilum, kosta úr umleið **1.099 kr.** í Economy-flokkinum upp til umleið **2.677 kr.** í Premium-flokkinum.

Dátu grundarlagið at gera ein tílíka talvu fyri píkadekk er ikki í teimum tølum kappingareftirlitið hevur fingið. Hetta er tí at har eru ov nógvir variablar til ov fáar observatiónir til hesa greining.

Tó er grundarlagi fyri at finna einstøku ávirkanina fyri tað at eitt dekk er píkadekk. Her hevur kappingareftirlitið funni eina miðal prísøking á einum píkadekki sammett við eitt vetrardekk. Ein skal vænta at í miðal kostar eitt píkadekk 993 kr meira enn eitt samanberiligt vetrardekk á føroyska marknaðinum.

4.6.3 Samanumtøka

Samanumtikið kann sigast um bæði summardekk, heilársdekk og vetrardekk at í sambandi við bilkeyp, hevur støddin a dekkunum týdning fyri teir rakstrarkostnaðir, sum fara verða við at eiga bilin. Tað kostar áleið 4.371 kr. meira at skifta dekk á einum bili við stórum dekkum sammett við ein bil við lítlum dekkum.

Í sambandi við dekkkeyp kann tilmælast brúkarum at hava í huga, at um eitt dekk t.d. kostar 900 kr. og hoyrir til Economy bólkin, so kunna tað verða dekk í Mid range bólkinum fyri á leið sama prís. Tað kann eisini verða eitt gott hugskot at sláa dekki upp í datagrunninum hjá EPREL fyri at síggja hvat stendur um dekkið, og at finna ummælir av dekkunum.

Kappingareftirlitið hevur tikið stikprøvar av donskum prísum á samanberuligum dekkum sum bæði danskir online handlar selja og føroyskir veitarar. Prísmunirnir kunna verða rættuliga stórir, men báðar vegir. Tað vil siga at í førum vóru donsku dekkini online handlarnir bíligari og í førum vóru føroysku veitararnir bíligari.

Kappingareftirlitið metti at prísspenni millum føroyska og danska prísir var so vítt og ymisk, at tað var ikki møguligt at gera eina beinleiðis príssamanbering.

Her er týðandi at viðmerkja at føroysku prísirnir ofta er við sporing og áseting.

5 Endaviðmerkingar

Við hesari grein hevur Kappingareftirlitið roynt at lýst hvussu prísirnir ávirkast á føroyska dekkmarknaðinum grunda á hvat fyri viðurskifti dekkini í Føroyum eru umfatað av. Kappingareftirlitið hevur víst á, hvør samanhangurin er ímillum støddd á dekkunum, góðsku og uppfatan av góðsku og hvat hetta ger við prísirnir á føroyska marknaðinum.

Hóast dekkmarnaðurin tykist torskildur, so eru dekkstøddin avmarkað til tað sum bilframleiðarin viðmælur, og avmarkar hetta valmøguleikarnir.

Tó ber til at kanna vøruúrvalið av dekkum, ið passa til bilin og hyggja at ummælum, prísum og EPREL metum, fyri at finna útav hvør tørvurin er og tí keypa dekkini á einum upplýstum grundarlagið.

Eisini eru útlendskir veitarar, ið flyta dekk til landi. Umvegis teir er eisini møguligt at finna eitt gott tilboð ella eini ávís dekk, ið er við til at stimbra um kappingina.

Kappingareftirlitið hevur eisini víst á at marknaðurin í Føroyum er ókonsentreraður við einum HHI á 1195, sum merkir at har eru ríkir møguleikar fyri góðari kapping. Tó er dekkmarknaðurin torskildur og leiðir hetta møguliga til, at keyparin ikki fær tryggja sær at tey fáa tað vøruna fyri tann prísin sum keypari annars hevði ynskt. Kappingareftirlitið mælir eisini til, at tá ið dekk vera seld skal seljari kunna um aldurin á dekkunum.

Keldur

https://www.tireagent.com/blog/what-are-radial-tires?srsltid=AfmBOopDYMiku9kFUMBS6rCuvnW-94_2DgRgU8TZf1RiL_U3BjD0nAQ_

https://politi.fo/logir-og-kunning/kunning-um-dekk

https://kvf.fo/greinar/2021/05/07/kunnu-koyra-vid-pikadekkum-til-halvan-mai

https://www.etrma.org/tyres/

https://www.tyrereviews.com/Tyre

https://www.fstyr.dk/privat/krav-til-koeretoejer/vejledning-om-daek

TAKS

Hagstova Føroya

Danmarks Statestik

https://www.bridgestonetire.com/learn/maintenance/how-long-a-tire-lasts/#

https://kvf.fo/greinar/2021/05/07/kunnu-koyra-vid-pikadekkum-til-halvan-mai

https://energy-efficient-products.ec.europa.eu/product-list/tyres_en

https://eprel.ec.europa.eu/screen/product/tyres

6 Appendix

Talva A1: Konfidensinterval fyri vetrardekk

Vetrardekk	Economy/budget	Mid range	Premium
Lítil	[610 : 865]	[794 : 1386]	[1014 : 1735]
Undir miðal	[720 : 1198]	[785 : 1976]	[1167 : 2411]
Miðal	[745 : 1298]	[941 : 2299]	[1662 : 3041]
Yvir miðal	[979 : 1599]	[825 : 2421]	[1742 : 3268]
Stór	[844 : 1589]	[1422 : 3199]	[2215 : 4113]

Kelda: Egnar útrokningar

Talva A2: Konfidensinterval fyri summardekk

Summardekk	Economy/budget	Mid range	Premium
Lítil	[643 : 792]	[818 : 1180]	[828 : 1290]
Undir miðal	[635 : 913]	[892 : 1629]	[951 : 1734]
Miðal	[786 : 1118]	[1215 : 2063]	[1334 : 2201]
Yvir miðal	[780 : 1133]	[1111 : 2104]	[1588 : 2553]
Stór	[862 : 1335]	[1499 : 2631]	[2052 : 3302]

Kelda: Egnar útrokningar